# Dynamitt klárt at fara í luftina



*Dynamitt spælir aftur sum í gomlum døgum. Tónleikararnir, sum nú eru savnaðir til eina seinastu framførslu, eru: Jógvan Mørkøre, Ingi Isaksen, Niclas Heri Jákupsson, Emil Gunnarstein, Olaf Ellingsgaard og Hans Jacob Nystrøm*

**Gamla manningin í poppbólkinum Dynamitt venur í hesum døgum í Klaksvík. Leygarkvøldið fara teir at spæla á Summar Festivalinum, og tað verður seinasta framførslan hjá bólkinum við teimum mongu hittunum**

Tað verður ein heilt serlig løta hjá poppbólkinum Dynamitt, tá ið bólkurin fer á pallin á Summar Festivalinum leygarkvøldið.

Framførslan hjá teimum verður fyri størstu áhoyrarafjøld, sum teir nakrantíð hava spælt fyri, og tað er nakað, sum bólkinum dámar, tí teir eru tiltiknir fyri at duga at fáa fólkið við sær.

Harafturat verður framførslan helst tann seinasta nakrantíð hjá Dynamitt.

– Eg rokni við, at hetta verður seinastu ferð, at vit spæla saman sum Dynamitt. Hetta er eitt gott høvi hjá okkum at seta eitt veruligt punktum fyri bólkin, sigur Niclas Heri Jákupsson, sum er ein av tónleikarunum í bólkinum.

### Landskendir fyri sín tónleik

Dynamitt gjørdist landskent fyri sínar livligu framførslur til dansitiltøk kring landið, og tá ið teir fóru at geva tónleik út. Slagarar sum Omman við Gjógv, Grøv nummar 13, Bangin, Pápi tín býr ei í Tórshavn og aðrir hava gjørt bólkin til ein tann besta seljandi bólkin í landinum nakrantíð.

Leygarkvøldið ber til at hoyra teir spæla nógvar av sínum kendu sangum, og í hesum døgum fyrireika teir seg til framførsluna.

Allir tónleikararnir, sum mannaðu bólkin í teimum mest virknu árunum, eru savnaðir aftur í Klaksvík, og teir gleða seg óført til brakið leygarkvøldið.

STARVSLÝSING

## Deildarleiðari til bygningadeildina

Við hesum verður søkt eftir arkitekti til bygningadeildina hjá Landsverki at seta sum skjótast. Rætta fólkinum kunnu vit bjóða eitt spennandi og áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávan er at leiða og standa fyri bygningadeildini.

Høvuðsuppgávurnar hjá bygningadeildini fevna um nýbygging og viðlíkahald av almennum bygningum. Harumframt tekur deildin lut í viðgerð av øðrum málum, har bygging og bygningar, landslag og formlist eru partar av hesum. 4 fólk starvast á bygningadeildini.

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir arkitekti, helst við royndum innan leiðslu. Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, og rokna vit við, at viðkomandi hevur góð samstarvsevnir, er førur fyri at eggja og ganga undan, og kann geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjamálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (CV) verður at senda til:

Landsverk
Postboks 78
110 Tórshavn

og skal vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 1. september 2005. Merkið brævbjálvan "Deildarleiðari til bygningadeildina". Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Oyvind Brimnes, stjóra, á tel. 31 13 33 ella á lv@lv.fo.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

## 200 nýggja heimasíðu



Føroya fremsti rokkbólkur í løtuni, 200, hevur fingið nýggja heimasíðu, har til ber at fáa nakað so ósannlíkt sum samband við 200. Síðan liggur á www.tveyhundrad.net

Hon hevur tíðindi, myndir og annað stuttligt um og við bólkinum.

Umframt at vera dugnaligir tónleikarar hava Niels og Uni úr 200 nógvar royndir sum fløguhúsasmiðir, og teir vunnu eisini ein AME fyri besta fløguhúsa, og teirra myndlistarligu evni koma til sín rætt á heimasíðuni.

**nu**

## Festivalbólkar selja nógvar fløgur

Fýra festivalaktuellir bólkar eru í toppinum á sølulistanum hjá 3'aranum, talan er um Europe á øðrum plássi, Nephew á triðja plássi, Blue Foundation á fjórða plássi og Brian McFadden á sætta plássi, men eingin av hesum megnar at koppa Nólsoyinginum í Havn: Kim Hansen.

Kim er einasta føroyska navnið á top 10 listanum hesa vikuna.

**nud**